Landssjúkrahúsið

2017-2019

# #ViteruLS

## Gerandisdagurin á Landssjúkrahúsinum




Samskiftiseindin

# Innihaldsyvirlit

**Gerandisdagurin hjá patologinum** ..... 2
**Uppgávan er ikki bert at koyra skjótt** ..... 3
**Smittuverja er týdningarmikil á einum sjúkrahúsi** ..... 4
**Beinta hevur fjølbroyttar uppgávur í barna- og ungdómspsykiatriini** ..... 5
**LS eigur einastu metro í Føroyum** ..... 5
**Venjing ger mun fyri lívsgóðskuna hjá hjartasjúklingum** ..... 6
**Elisabeth er um tey doyggjandi** ..... 7
**Matur er umsorgan og partur av viðgerðini** ..... 9
**Fjølbroyttar uppgávur á Fyrisitingini** ..... 10
**Hvørjar uppgávur hevur ein radiografur?** ..... 11
**Økispsykiatriin - eitt tilboð um røkt og viðgerð í nærumhvørvinum** ..... 13
**Kjartan og Pól Jákup, tvey av mongu andlitunum á LS** ..... 14
**Telemedisin – læknahjálp uttan landamørk** ..... 15
**Farmaceutur á LS** ..... 16
**Tappa einar 30-40 blóðgevar um vikuna** ..... 17
**Annfinn varðar av KT tøknini á Landssjúkrahúsinum** ..... 18
**Hvat ger ein læknaskrivari?** ..... 19
**Rannsóknarstovan er útgjørd við hópin av nýmótans tøkni** ..... 20
**Millum 10.000 og 15.000 fet um dagin í Goymsluni** ..... 20
**Jóan Símun er í bygginevndini** ..... 22
**Sjúkrahúsprestur og sálarhirði** ..... 23
**Á føðideildini er ongin dagur eins** ..... 26
**Bamsuskaðastova á Mentanarnátt** ..... 29

# Gerandisdagurin hjá patologinum

Á niðastu hædd á Landssjúkrahúsinum heldur Maciej Kaminski til. Hann er yvirlækni innan patologi og fæst við at gera mikroskopiskar kanningar av vevnaði. Harafturat ger hann líkskoðanir.🧑‍⚕️⚕️🔬

Kaminski, sum hann verður róptur á LS, er ættaður úr Póllandi og hevur starvast sum lækni seinastu 30 árini í fleiri ymiskum londum. Seinastu 12 árini hevur hann verið í Føroyum, og dámar honum sera væl. Áðrenn tað hevur hann verið lækni í Onglandi, Týsklandi og Libya. 🇫🇴FO🇬🇧GB🇩🇪DE🇱🇾LY🇵🇱PL

Hann tosar enskt, og skilur eitt sindur av føroyskum, men heldur ikki, at málið er nakar trupulleiki. Hann hevur ikki nógv beinleiðis samband við sjúklingar, men hevur ein týðandi leiklut handan leiktjaldið.



Gerandisdagurin gongur fyri seg á Rannsóknarstovuni, har hann ger kanningar av vevnaði o.ø. frá sjúklingum, fyri at staðfesta sjúku, so til ber at veita røttu viðgerð. Hann nýtir mikroskop at hyggja eftir vevnaðinum, og fær eisini flutt myndirnar yvir á skerm og gjørt tær størri.

Tað er týðiligt, at hann er royndur og brennur fyri starvinum, tá hann greiðir frá arbeiðsuppgávuni. Eitt stórt mikroskop stendur við telduna á skrivaraborðinum, og við síðuna av er eitt borð fylt við stakkum av fakbókum, sum eru væl skipaðar í ymisk fakøkir.



Tá fólk doyggja av ókendum ávum, ger hann líkskurð fyri at staðfesta deyðsorsøk, um tørvur er á tí og um tey avvarðandi ynskja tað. Líkskoðan gongur fyri seg í sektiónsstovuni, og verður framt saman við einum øðrum starvsfólki við serútbúgving innan økið. Kaminski greiðir frá, at hetta altíð skal ganga fyri seg við virðing fyri tí deyða.

Í ár hevur hann framt 15 líkskurðar, so tað er ikki ein uppgáva sum fyllur nógv í gerandisdegnum hjá honum á LS.

Á Mentanarnátt seinnu árini, tá LS veitir borgarum rundvísing, hevur Kaminski tikið ímóti í sektiónsstovuni og greitt frá síni arbeiðsuppgávu har.

Spurdur um, hvussu leingi hann fer at halda fram sum patologur á LS, smílist hann og sigur seg vóna, at onkur føroyskur lækni fer at lesa víðari innan patologi, sum við tíðini kundi yvirtikið hansara leiklut í føroyska heilsuverkinum, áðrenn hann sjálvur fer frá.

## Uppgávan er ikki bert at koyra skjótt




Allan Samuelsen hevur koyrt sjúkrabil í nærum 17 ár. Ikki ein dagur er farin framvið, har hann ikki hevur glett seg til at møta á vakt. 🚑👍

Tað er ikki tí at uppgávan altíð er løtt. Allan hevur upplivað at missa smá børn, og tað er serliga hart, tá man sjálvur hevur børn, sigur hann. Men hinvegin hevur hann eisini roynt at tikið ímóti einum barni saman við ljósmóðir í sjúkrabilinum onkustaðnis sunnanfyri Hósvík. Ein fantastisk uppliving, sum fór fram uttan trupulleikar, leggur Allan afturat.

Eg kenni, at eg geri mun, og eg elski at arbeiða við fólki, sigur Allan. At byrja við var spennandi at koyra skjótt, men ikki var leingi, til mær dámdi betur at vera aftanfyri saman við sjúklinginum, har mín fakligheit kemur í spæl. So eg og starvsfelagin klandrast ikki um, hvør skal koyra, men heldur um hvør skal sita aftan.



Uppgávan hjá ambulancufólkinum er ikki bara at koyra skjótt, men eisini at veita prehospitala viðger inntil sjúklingurin kemur undir læknahond á sjúkrahúsinum. Og hetta er ein tann týdningarmiklasta uppgávan í eini akuttari støðu.

Arbeiðið kann vera hart og krevur sterka psyku. Men vit hava eini 10 væl útgjørdar sjúkrabilar kring landið, og dugnalig og íðin ambulancufólk, ið eru klár alt samdøgrið at koyra út, tá telefonin ringir.

## Smittuverja er týdningarmikil á einum sjúkrahúsi

Á LS hava vit mannagongdir til alt, frá hvussu starvsfólk skulu vaska hendur í gerandisdegnum, til hvussu Ebola virus skal handfarast, um tað hevði verið staðfest í Føroyum.



Lena Lambaa er sjúkrarøktarfrøðingur við serkunnleika innan smittuverju.

Hon arbeiðir m.a. við undirvísing av starvsfólkum innan hetta økið, ger leiðreglur fyri, hvussu amboð skulu vaskast, og vegleiðir ymsu deildunum á Landssjúkrahúsinum.

Skuldi onkur komið til Føroyar við álvarsamari smittandi sjúku, so hava vit eina isolatiónsstovu og draktir til starvsfólk.

Nýggi H-bygningurin verður tó enn betur útgjørdur við tveimum háisolatiónsstovum, ið eru púra atskildar frá øllum øðrum á Landssjúkrahúsinum. T.v.s. onnur skipan til útlufting, vatn, skrell og við egnari inngongd.



Endamálið við smittuverju er at minka um smittuútbreiðslu. Á einum sjúkrahúsi eru nógv fólk á einum stað, harav sjúklingar, sum eru meira viðkvæmir fyri bakterium enn onnur.

Sum vitjandi kanst tú hjálpa at minka um smittuvandan, við at spritta tær hendurnar, tá tú kemur inn um høvuðsdyrnar á Landssjúkrahúsinum, og aftur tá tú fert til hús.

# Beinta hevur fjølbroyttar uppgávur í barna- og ungdómspsykiatriini

Hóast nógv framkomin útgerð verður nýtt á Landssjúkrahúsinum, so er eitt tað týdningarmesta amboðið starvsfólkið sjálvt – serliga innan psykiatriina.



Beinta er eitt av tíggju starvsfólkum í barna- og ungdómspsykiatriini, og starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur. Hon fekk áhuga fyri psykiatriska økinum, tá hon var í praktikk á psykiatriska deplinum. Nú hjálpir hon børnum og ungum og familjum teirra ...við menningarórógvi, sum t.d. autismu og ADHD ella sálarligum avbjóðingum sum t.d. etingarólag, tunglyndi, ótta og psykosu.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar, og umfata útgreinan og viðgerð av børnum og ungum upp til 18 ár. Týðandi í arbeiðinum er, at tey avvarðandi verða tikin við í sjúklingagongdina hjá sjúklinginum.

Harumframt inniber arbeiði nógv samstarv við eitt nú Sernám, barnavernd, skúlar, barnagarðar og Almannaverkið.
Seinni árini er tilfeingið økt á psykiatriska deplinum, sum hevur viðført at bíðilistin til útgreinan innan børn&ung er minkaður, samstundis sum fleiri tilboð eisini eru sett í verk.

Umframt sjúkrarøktarfrøðingar starvast eisini sálarfrøðingar, lækni, yvirlækni og læknaskrivari á deildini.

# LS eigur einastu metro í Føroyum



Jón Magnus er ein av fýra "tokførarum" á 1 km langu tokrutuni undir J.C. Svabosgøtu – einasta metro í Føroyum. 🚂🚃🚃🚃🚃🚃🚃
Tokið koyrir fleiri ferðir um dagin við mati, vaskiklæðum o.ø. Her fer Jón Magnus oman við 9 vognum av døgurðamati frá køkinum niðanfyri vegin oman til høvuðsbygningin.
Uden mad og drikke, duer helten ikke!

# Venjing ger mun fyri lívsgóðskuna hjá hjartasjúklingum

Fyri tíð síðani byrjaði fysioterapideildin á Landssjúkrahúsinum at venja styrki og kondition við hjartasjúklingum.

Fleiri fysioterapeutar luttaka í venjingini av hjartaliðnum, teirra millum Anna Maria og Sarita. Í tíðini aftaná ein hjartatilburð er vælkent, at sjúklingar óttast at strongja seg, fáa pulshækkan og gerast pøstir. Venjing í tryggum umstøðum saman við fysioterapeutum ger, at sjúklingar koma betur og skjótari fyri seg.



Tað eru í høvðusheitum tveir venjingarhættir:

- ein fyri sjúklingar sum eru skurðviðgjørdir í hjartanum, t.d. aftaná bypass- og hjartaloku skurðviðgerðir

- ein fyri sjúklingar, sum hava niðursetta pumpustyrki í hjartanum.

Fyrri bólkurin kann ofta byrja við hægri orku, meðan tann seinni krevur longri tíð við lægri orku. Endamálið er tó í báðum førum at endurvenja hjartað og likamið sum heild.

Hjartalið sum hesi hava ikki verið á Landssjúkrahúsinum í 10 ár. Síðani í vetur hava eini 30-40 fólk verið í gongd ella eru liðug við venjingina. Tey venja í 12 vikur og fáa síðani bjóðað at koma til eftirfylgjandi kanning. Tey luttakandi eru flest menn í aldrinum 40 og upp í 83 ár.

Venjingin er evidensbaserað og byggir á nýggjastu vitan innan økið. Hon betrar nógv um fysisku orkuna, sum viðførur, at tey luttakandi tora betur at røra seg. Hetta ger stóran mun fyri lívsgóðskuna.



Venjingin er liður í eftirviðgerð hjá teimum hjartasjúklingum sum sambært hjartalæknum hava serligan tørv.

**#viteruLS**

# Elisabeth er um tey doyggjandi

Á medisinsku seingjadeildini B6 er ein palliativ eind við tveimum stovum. Hetta eru stovur til krabbameinssjúklingar sum eru komnir í terminalu fasuna, har fokus er á linnan og at veita sjúklinginum so virðiligar umstøður sum gjørligt seinastu tíðina.

Elisabeth starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur á palliativu eindini, har hon trívist væl við fjølbroyttu uppgávunum.
Endamálið við eindini er at fyribyrgja líðing undir sjúkraleguni, umframt at fremja lívsgóðsku fyri bæði sjúkling og tey avvarðandi. Somuleiðis at viðvirka til at tey avvarðandi megna at meistra sorgina, tá sjúklingurin er farin.



Elisabeth, sum starvast á palliativu eindini

Elisabeth hevur starvast á eindini í 3 ár, og er í gongd við eftirútbúgving innan sjúkrarøkt til krabbameinssjúklingar, sum eisini fevnir um palliatión. Útbúgvingin tekur 1 ár og 7 mánaðir, og eru tær 5 sjúkrarøktarfrøðingar á B6, sum eru í gongd við útbúgvingina.

Palliatión merkir linnan, og verður deilt í 3 fasur.
Tíðliga palliativ fasa er, tá sjúklingurin er í lívsleingjandi viðgerð. Hon kann vara í fleiri ár.
Sein palliativ fasa er, tá lívsleingjandi viðgerð ikki er møgulig longur, og har fokus verður sett á linnan, lívskvalitet, røkt og umsorgan. Hendan fasan kann varða í mánaðir.
Í terminal fasuni er sjúklingurin doyggjandi og tá er fokus á linnan. Hendan fasan kann vara dagar ella vikur, og tað er oftast tá ið sjúklingurin verður innlagdur á palliativu eindina.

At arbeiða við palliatión krevur at vera sálarliga sterkur. Serliga er hart at vera um yngri foreldur við børnum. Tá vegleiðir Elisabeth foreldrini og avvarðandi um, hvussu tey kunnu inndraga børnini í sjúkugongdina, hvat tey grundleggjandi hava tørv á í kreppu, og hvussu tey kunnu reagera í mun til aldur.

Hon greiðir frá, at tó slík støða kann ávirka, er hon tilvitað um skyna ímillum tað persónliga og tað professionella, soleiðis at hon altíð megnar at vera professionell í arbeiðinum.
Spurd um hvør tekur sær av henni, um tørvur er tí, svarar hon, at á deildini eru starvsfólkini sera góð til at supervisera og taka hond um hvønn annan, og at man við tíðini lærir at leggja arbeiðið frá sær, tá man fer heim.

Á palliativu eindini verður stórur dentur lagdur á tvørfakligt samstarv við eitt nú lækna,

palliativa toymið, fysioterapeut, prest og primera sektorin, eins og starvsfólkini kunna um hvat Krabbameinsfelagið og eitt nú Berin kann hjálpa við.

Inni á á palliativu stovunum er bæði køkur og baðirúm, umframt stovumøblar og sjónvarp, soleiðis at umstøðurnar eru so góðar sum gjørligt hjá teimum avvarðandi at vera um og saman við sjúklinginum.



Summir sjúklingar ynskja at doyggja heima, og onnur vilja sleppa heim, møguliga bert í nakrar tímar. Tá verður gjørt alt fyri at samskipa soleiðis, at hetta letur seg gera.

Elisabeth heldur, at tørvur er á eini krabbameinsdeild við palliatión burturav, tí fleiri fólk fáa staðfest krabbamein, men liva eisini longri við sjúkuni, tí viðgerðarhættir áhaldandi betrast. Hon kundi tí hugsa sær, at hennara fakøki bleiv raðfest hægri í heilsuverkinum.

Tá deyðin er partur av gerandisdegnum, er týdningarmikið at hava lætt sinnalag og humor, og tí hava starvsfólkini eisini nógvar stuttligar løtur, hóast álvarsomu umstøðurnar. Arbeiði á palliativu eindini er týdningarmikið. Tað fáa starvsfólkini javnan at vita frá teimum avvarðandi.
“Tí kenni eg tað eisini, sum um eg geri veruligan mun” sigur Elisabet.



Starvsfólk á medisinsku seingjadeildini B6, har 2 palliativar stovur eru til krabbameinssjúklingar.

# Matur er umsorgan og partur av viðgerðini

Matur er umsorgan, meina tey í køkinum á Landssjúkrahúsinum. 🍲🥗🍗🍗🍅🍎🥦👍🍰
Góður matur og góðar máltíðir eru umráðandi fyri heilsu og vælveru hjá sjúklingum á Landssjúkrahúsinum. Tað er partur av viðgerðini, sigur Gyða í Gongini, sum er kostfrøðingur á Landssjúkrahúsinum. Serliga fyri tey, við ringum matarlysti, ið hava tørv á fleiri orkutættum máltíðum.



Seinastu árini hava Gyða í Gongini og Miriam Solmunde, ið báðar eru kostfrøðingar, arbeitt saman við hinum starvsfólkunum í køkinum við at betra um matin úr køkinum.

Tær báðar eru dagliga úti á hvør sínari deild, har tær borðreiða døgurða og bjóða sjúklingunum millummálar. Soleiðis hava deildir og køkur fingið eitt millumlið, sum er við til at styrkja tvørfakliga samstarvið.

Størri dentur er lagdur á, at maturin skal síggja leskiligur út, smakka væl og hann skal tillagast tørvin hjá tí einstaka sjúklinginum. Flestu sjúklingar hava tørv á eyka orku og proteini. Tí verður eyka stórur dentur lagdur á millummálarnar.



Útvaldar deildir hava fingið nýggjar smærri bakkar og borðbúnað, serviettar prýða bakkan og salt og pipar kemur við matinum, so sjúklingarnar sjálvir kunnu smakka til.



Afturat hesum hava tey í køkinum máta matarspill fyri at optimera nøgdirnar, so sum minst fer burtur. Arbeiði hevur eydnast væl, og Gyða og Miriam arbeiða framhaldandi við at vísa sjúklingum umsorgan og verða partur av teirra viðgerð við góðum mati.

Vælgagnist! 😀

**#ViteruLS**

# Fjølbroyttar uppgávur á Fyrisitingini

Linda og Lucia arbeiða báðar á fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum. Fyrisitingin er staðsett á Eirargarði, ella "omanfyri vegin", sum tey flestu siga innanhýsis á LS.



Linda og Lucia, sum báðar arbeiða á Fyrisitingini

Linda, sum upprunaliga er av Fílabeinsstrondini, starvast á fíggjardeildini saman við 7 øðrum starvsfólkum. Hon er útbúgving innan skrivistovuyrki og er nú í fer við akademiútbúgving á Handilsskúlanum.
Hon hevur verið á fíggjardeildini í hálvtannað ár.

Nógv er um at vera á einum so stórum arbeiðsplássi sum Landssjúkrahúsinum, og høvuðsuppgávurnar hjá henni eru at taka sær av tollavgreiðslu, at avstemma og avgreiða rokningar.
Avbjóðingarnar eru ymiskar í gerandisdegnum, tí á kontórinum har hon situr, skiftast tey um ymsu uppgávurnar, eins og øll starvsfólkini skulu hava førleikar at nýta tær KT skipanirnar, sum eru neyðugar fyri at kunna fremja ymsu arbeiðsuppgávurnar. Linda greiðir frá, at starvið ber brá av at vera á einum stórum arbeiðsplássi, tí hon hevur nógv samskifti við onnur, bæði innanhýsis og við uttanhýsis veitarar. Hetta dámar henni væl.
Linda flutti við foreldrum sínum til Føroya sum 17 ára gomul. Hennara móðurmál er franskt, men hon tosar sera væl føroyskt og heldur ikki at málið er nakrar trupulleiki yvirhøvur.

Linda og Lucia kendu til hvørja aðra ígjøgnum felags vinfólk, innan tær gjørdust starvsfelagar á Landssjúkrahúsinum.

Lucia byrjaði á lønardeildini fyri áleið hálvum ári síðani. Hon er úr Slovakia, haðani hon er útbúgvin Master in Finance. Lønardeildin avgreiðir lønir til tey uml. 1000 starvsfólkini, sum eru á lønarlistanum hjá Landssjúkrahúsinum, og sum umboða uml. 30 ymsar starvsbólkar.
Á deildini eru tí nógvar ymiskir fakbólkar og sáttmálar at fyrihalda seg til.

Gerandis uppgávurnar hjá Luciu umfata skráseting og at fremja broytingar innan lønarviðurskifti hjá starvsfólki, at avgreiða lønir og veita hagtøl fyri ymsar lønarbólkar.
Hon heldur, at hennara útbúgving kemur væl í spæl í gerandisdegnum, og sigur at hon gleðir seg at koma til arbeiðis hvønn dag.

Lucia hevur brúkt nógva orku uppá at læra seg føroyskt tey 6 árini, ið hon hevur verið her. Hon greiðir frá, at tó hon hevur verið á skeið í føroyskum og lært torføru mállæruna, so heldur hon seg læra mest av, at starvsfelagar eru røsk at tosa føroyskt við hana heldur enn enskt og at hava tol við henni, tá hon av og á má leita eftir røttu orðunum.

Báðar siga tær seg trívast væl í fyrisitingini, ikki einans tí uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar, men eisini tí at sosiala umhvørvið er gott. Tað sosiala ein fær ágóðan av á einum arbeiðsplássi hevur eisini stóran týdning fyri trivnaðin, eru tær báðar einigar um.

## Hvørjar uppgávur hevur ein radiografur?

Røntgen-deildin á Landssjúkrahúsinum er útgjørd við nógvari framkomnari tøkni. Hetta eru stór og dýr tól, ið gera, at vit kunnu hyggja eftir tí, sum ikki sæst uttaná. 📸📷🔬🔬

Birita og Jákup eru útlærd sum radiografar og hava starvast á LS síðan ávikavist 2015 og tíðliga í 2017. Arbeiðið er spennandi, tí tú hevur bæði við fólk og tøkni at gera.



Radiografar eru serlærdir at handfara útgerðina á røntgendeildini, og júst hvussu rætta myndin skal takast,- tað kann vera røntgenmynd, CT- ella MR-skanning, ultraljóð kanningar ella gjøgnumlýsing.
Flest øll kenna, at tú tekur røntgenmynd fyri at staðfesta, um eitt bein er brotið. Men vit kunnu síggja nógv meira enn bara bein. Við gjøgnumlýsing kunnu vit t.d. síggja við livandi myndum, hvussu spísirørið arbeiður, meðan ein serlig væta verður drukkin. 🍹

MR-skannarin er eitt av tólunum á røntgen-deildini. Tólið kostar 10 mió. kr. og er í grundini ein stórur magnetur, sum skannar kroppin, so til ber at síggja neyvt hvar møguliga okkurt er áfatt.

Radiografurin stýrir skanningini og myndunum, og tryggjar innan, at einki magnetiskt metal sleppur inn í rúmið, har skannarin er. Fólk við magnetiskum metalli í kroppinum, sum t.d. pacemakara, metalsplintrum í eygunum frá t.d. sveising o.s.fr. mugu ikki í MR skannaran.

Læknin veit hvørjum kropsparti, hann vil hava mynd av, tá hann umbiður hana. Radiografurin veit, hvat fyri myndir skulu takast og hvussu fyri at fáa besta úrslit. Um tú skalt taka røntgen-mynd, so skal tú standa ella liggja rætt, og útgerðin skal vera innstillað rætt, so myndin best fangar tað, sum læknin ynskir at síggja. Soleiðis gert neyvari at stilla eina diagnosu.




Umframt umbidnar myndir frá læknum, taka radiografar sær eisini av mammografi screeningum, tvs. myndatøku av frískum borgarum sum fyribyrgjandi tiltak. Eitt nú fáa allar kvinnur í aldrinum 50-69 tilboð um at koma til myndatøku á Røntgendeildini annaðhvørt ár sum liður í screening fyri bróstkrabba, har ein mammografur verður nýttur til endamálið.

Radiografar skulu sostatt duga at handfara ymisk stór medico teknisk tól sum liður í at veita eina greiða diagnosu. 🔧🔧🧑‍⚕️

# Økispsykiatriin - eitt tilboð um røkt og viðgerð í nærumhvørvinum

Sálarsjúka ger gerandisdagin tungan hjá nógvum menniskjum. Fyri 10 árum síðan byrjaði økispsykiatriin við tí endamáli at bjóða fólki við sálarsjúku eitt tilboð um røkt og viðgerð í teirra egna nærumhvørvi.

Í dag fáa eini 150 fólk kring landið vitjan av økispsykiatriini hvørja viku, og síðan økispsykiatriin byrjaði hava út ímóti 800 fólk verið ígjøgnum skipanina og enda sína viðgerð.

13 sjúkrarøktarfrøðingar við drúgvum royndum innan psykiatriska sjúkrarøkt arbeiða við hesum.



Ein teirra er Borghild á Fløghamri, sum hevur arbeitt innan økispsykiatriina í Eysturoynni seinastu 6 árini.

- Eg havi altíð havt áhuga í sálarfrøðiliga partinum av sjúkrarøkt og at samskifta við fólk, sigur Borghild. Við økispsykiatriini koma vit út í heimið hjá fólki og fáa sostatt heildina av menniskjanum við. Hetta dámar mær sera væl.

Høvuðsuppgávan er at hjálpa fólki við sálarsjúkum so sum skizofreni, øðrum psykosum og bipolar sjúku. Harumframt teimum við tungum depressiónum og svárum ótta, har gerandisdagurin gerst ov trupul.

Økispsykiatriin er væl móttikin, nógv fólk hava verið ígjøgnum skipanina og vit hava fingið góðar afturmeldingar, sigur Borghild. Vit arbeiða tvørfakliga og í tøttum samstarvi við læknar og møtast einaferð um vikuna á psykiatriska deplinum til konferansu, fakliga sparring og førleikamenning.

Landið er deilt upp í 5 økir, og Borghild arbeiðir saman við Maibritt Jacobsen í økinum, sum fevnir um Fuglafjørð, Leirvík, Gøtu og eystara arm av Skálafjørðinum. Tær halda til á læknamiðstøðini í Runavík. Hinir sjúkrarøktarfrøðingarnir arbeiða út frá Oyri, Klaksvík, Tórshavn, Vági, Miðvági og Sandi – og dekka tilsamans alt landið.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir í økispsykiatriini vitja heima einaferð um vikuna – alt eftir tørvi hjá tí einstaka. Talan er mest um samtalur og terapi.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at venda tær til økispsykiatriina. Sí meira á heimasíðu okkara ls.fo

# Kjartan og Pól Jákup, tvey av mongu andlitunum á LS

Mong andlit eru á Landssjúkrahúsinum, sum sjúklingar og vitjandi ikki møta, men sum tó hava ein týdningarmikil leiklut í at reka eitt stórt og vælvirkandi sjúkrahús.



Fáur kennir Landssjúkrahúsið so væl sum Kjartan (t.v.), ið hevur starvast sum træsniðkari her í nærum 37 ár. Hann og Pól Jákup (t.h.) syrgja m.a. fyri viðlíkahaldi av teimum 1800 vindeygunum, 2000 hurðunum og 10.000 skápshurðunum á Landssjúkrahúsinum. 🔨🔧🔩 Hesir traðka eisini til, tá onnur starvsfólk hava tørv á fyrstuhjálp til uppgávur, ið krevja ein handverkara. 💪

# Køkurin á Landssjúkrahúsinum hevur úr at gera

Hvønn dag vera 150-300 máltíðir gjørdar tríggjar ferðir um dagin, umframt millummáltíðir og annað. 🥕🍲🍏 Í dag eru 16 fólk til arbeiðis í køkinum, og á matskránni er 98 litrar av gullasch, 60 litrar av eplamos og heimagjørt agurksalat. Harafturat hava tey bakað 36 kg av kaku og gjørt heilsugóðar tvíflísir og smyrjibreyð til kaféina.



**#ViteruLS**

## Telemedisin – læknahjálp uttan landamørk

Á Ambulatoriinum omanfyri J.C. Svabosgøtu starvast Edith sum sjúkrarøktarfrøðingur við serkunnleika innan húðsjúkur, - ella dermatologi. Hon hevur ein heldur øðrvísi arbeiðshátt at hjálpa sjúklingum við nýtslu av telemedisin.

Telemedisin er viðtala umvegis KT skipanir, har lækni og sjúklingur ikki eru í sama rúmi, men t.d. kunnu uppihalda seg í hvør sínum landi.



Sjúklingar við húðsjúku koma inn til Edith á húðambulatoriinum við tilvísing frá kommunulækna.

Hon spyr inn til trupulleikan, tekur myndir og leggur tær inn í eina tøkniliga skipan, sum húðlæknar í Roskilde hava atgongd til.
Teir hyggja eftir myndunum, og venda síðani aftur vanliga innan eitt samdøgur við, hvussu sjúklingurin skal viðgerast. Hareftir kunnu kommunulæknar í flestu førum útskriva resept til viðkomandi, ella sjúklingurin verður biðin at koma inn til nærri kanningar.

Dermatologiin á Landssjúkrahúsinum hevur nýtt hendan framferðarháttin síðan 2004, og tað hevur rigga væl. Hvørt ár koma eini 2500 tilvísingar, og sjúklingarnir fáa svar aftur innan fáar dagar.
Danskir húðlæknar eru so í Føroyum 8 ferðir um árið í 4 dagar.

Tveir teirra sum eru knýttir at Landssjúkrahúsinum verða javnan bidnir um, at undirvísa aðrastaðnis í teledermatologi, tí at hesin framferðarhátturin á Landssjúkrahúsinum, er ein av teimum størstu dagligt virkandi deildunum í heiminum sum nýta teledermatologi.

Mest vanligu húðsjúkurnar í Føroyum eru psoriasis og eksem, tí veðurlagið í Føroyum, kuldi og fuktur, - er ikki so gott fyri hesar báðar sjúkurnar. Eisini koma fólk við aknu o.ø., umframt at Edith ger biopsiir og allergiroyndir.

**Møguleikar innan onnur viðgerðarøki**
Telemedisin kann eisini nýtast innan onnur viðgerarøki – eitt nú var fyrsta telekonferanca hildin í fjør, har serlækni sat á einum donskum sjúkrahúsi, meðan sjúklingurin sat í Føroyum saman við einum sjúkrarøktarfrøðingi.

Hesin hátturin er sera væl eydnaður til umstøðurnar í Føroyum og kann koma at minka um talið av sjúklingum, ið Landssjúkrahúsið á hvørjum ári sendir uttanlands í viðgerð. Góðskan og viðgerðin er á høgum støði, eins og fyrimunir við telemedisin eru skjótari viðgerð og styttri bíðitíð til viðtalu hjá serfrøðingi, ið er staddur uttanlands.

Telemedisin kann eisini vera ein loysn umborð á skipum, tá ið manningin hevur tørv á læknahjálp, ið ikki er akutt, og á tann hátt kann koma í samband við læknar í Føroyum og uttanlands.

KT-loysnir skulu skapa betri kunning til sjúklingin og avvarandi og geva teimum vitan um sjúku og sjúkugongd á Landssjúkrahúsinum. Alt hetta eru viðurskifti, sum komandi H-bygningurin fer at taka atlit til, tá hann stendur klárur at nýta í 2021.

**#ViteruLS**

## Farmaceutur á LS

Heilivágur hevur alstóran týdning fyri tey sum hava tørv á honum, og er tí ein týðandi partur av útreiðslunum hjá Landssjúkrahúsinum, sum kemur sjúklingunum tilgóðar. 💊💊💉💉
Á fíggjarætlanini fyri 2017 vóru 42 mió. kr. settar av til serstakan sjúkrahúsheilivág + uml. 13-14 mió. til vanligan heilivág.

Niels Joensen starvast hálva tíð sum farmaceutur (heiliráðfrøðingur) á Landssjúkrahúsinum og hálva tíð hjá Apotekinum. Starvið inniber at hann ráðgevur deildunum um heilivág og ger vegleiðingar og mannagongdir innan heilivágsøkið. Endamálið er at betra um trygd og dygd innan heilivágsøkið á LS.



Harafturat hevur hann arbeitt við at optimera heilivágsgoymsluna á Landssjúkrahúsinum fyri at minka um spill, soleiðis at vit fáa mest og best fyri pengarnar.

Heilivágur kann verða dýrur, alt eftir hvat slag tað er, og tí er týdningarmikið at vit nýta rættan heilivág, hava passandi mongd og at hesin verður goymdur á rættan hátt, so sum minst fer til spillis.

Niels er eisini partur av Heilivágsráðnum, sum hevur umboð úr Heilsumálaráðnum, Apotekinum og Sjúkrahúsverkinum. Ráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av skipanini fyri serstakan sjúkrahúsheilivág.
Serstakar viðgerðir kunnu kosta heilt upp til nakrar milliónir um árið per sjúkling, so tað kann vera trupult at raðfesta, tá serstakur heilivágur skal keypast. ⚖️⚖️

Arbeiðið hjá Niels við at optimera heilivágsgoymsluna hevur havt stóran týdning fyri at rationalisera heilivágsnýtsluna og betra um trygdina.
**#ViteruLS**

## Tappa einar 30-40 blóðgevar um vikuna

Í blóðbankanum á Landssjúkrahúsinum kunnu fólk geva blóð og harvið vera við til at bjarga lívi. Hvørja viku tappa tey blóð frá eini 30-40 blóðgevum, og tørvurin á blóðgevum er altíð stórur.



- Um eingin gav blóð, vóru nógv, sum ikki stóðu til at bjarga, sigur Joan Petersen, deildarleiðari í Blóðbankanum.

Tað kemur enntá fyri nakrar ferðir um árið, at blóðgevar verða uppringdir mitt á nátt at geva blóð akutt til sjúkling. Hetta kann gerast... bjargingin fyri sjúklingin.

Sagt verður, at í minsta lagi 5% av fólkatalinum í einum landi mugu geva blóð fyri at nøkta tørvin. Í Føroyum er talið nakað undir 5%, og nógv eru trupul at fáa fatur á, m.a. tí tey búgva uttanlands ella í útjaðaranum.

**Hvussu ofta gevur man blóð?**
Fólk kunnu, í mesta lagið, geva blóð 3. hvønn mánað. Hjá summum gongur tó longri tíð ímillum, meðan onnur verða tappað meira regluliga. Hetta kemst av, at býtið millum blóðflokkarnar er ymiskt, og at nýtslan av ávísum blóðflokkum er størri enn onnur.

At geva blóð tekur bert 5-10 minuttir, og tú merkir einki uttan eitt lítið prik. Ein hálvur litur av blóði verður tappaður, sum so verður býttur í tríggjar ymiskar blóðúrdráttir, og kann

hesin hálvi liturin sostatt hjálpa trimum ymiskum sjúklingum. Aftaná fæst okkurt at drekka, meðan hvílt verður í 10 minuttir.



Tørvur er á blóði til eitt nú:
• Skurðviðgerðir
• Bløðingar
• Skaðatilburðir
• Blóðtrot orsaka av medisinskum sjúkum, t.d. krabbameini.

**Kann eg geva blóð?**
Øll, sum eru frísk, viga 50 kg ella meira og eru ímillum 18 og 60 ár, kunnu melda seg til blóðgeva. Tó kunnu ymsar orsøkir, so sum heilivágur og annað, gera at ein persónur ikki kann geva blóð.

Ynskir tú at gerast blóðgevi, kanst tú skráseta teg á www.gevidblod.fo.
Møguleiki er at geva blóð bæði á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi.

## Annfinn varðar av KT tøknini á Landssjúkrahúsinum

Nógv tøkni skal til fyri at halda Landssjúkrahúsinum koyrandi. . Eini 700 teldur, 300 servarar, 80 printarar , 2 datasentur og nakrar stórar KT-skipanir, sum tryggja at upplýsingar um sjúklingar o.a. eru goymdir trygt og at røttu fólkini hava lætta atgongd.



Anfinn Thomsen er leiðari á KT-deildini, ið telur 7 fólk. Tey hava ábyrgd av øllum frá at dagføra teldur til at reka stóru KT-skipanirnar á LS.

Um ein telda ikki riggar onkunstaðni á Landssjúkrahúsinum, so ringja vit til KT-skivuna og tey loysa trupulleikan.

KT-deildin viðlíkaheldur eisini KT-kervið og tær stóru KT-skipanirnar. Allir upplýsingar verða goymdir í tveimum servararúmum. Um annað gongur fyri, so slær hitt til innan nøkur fá millisekund, uttan at nakar merkir tað.
Anfinn leggur afturat, at talið av printarum hava verið uppi á eini 200, men er nú komið niður á 80. Hetta kemst av, at vit hugsa meira um umhvørvið og goyma heldur upplýsingar talgilt.

## Hvat ger ein læknaskrivari?

Orðið leggur kanska upp til, at tað er ein, sum bara skrivar. Men okkara læknaskrivarar kunnu sigast at vera tann reyði tráðurin í sjúklingagongdini her á Landssjúkrahúsinum.

Beinta Nygaard er ein av 15 læknaskrivarum á skurðdeplinum, ið eisini umfatar eini 25 læknar og konsulentar. Læknaskrivararnir senda áleið 10.000 innkallingar um árið til sjúklingar, og eru ofta vinaliga røddin í telefonini, ið kunnar teg um hvat fer at henda, um tú skalt til viðgerð ella annað. 📞



Eg elski mítt arbeiði, sigur Beinta. Eingin dagur er eins, og eg føli at eg geri mun. Beinta hevur starvast sum læknaskrivari í Føroyum síðan 2003, umframt at hon hevði fleiri ár av royndum við sær heim úr Danmark áðrenn hetta.

Læknaskrivarin fær avtalur í lag við læknan, formidlar røttu kunningina, skrásetur, skjalfestir... you name it. Um læknin t.d. sigur, at tú skalt leggjast undir skurð, so samskipar læknaskrivarin við skráseting rætta stað og innkallar. Um tú evt. skalt av landinum til viðgerð, so syrgir læknaskrivarin fyri, at røttu skjøl koma á innkallingarstaðið og boðar Uttanlandstænastuni á LS frá, sum samskipar tína ferð.

Læknaskrivarar fáa nógvar uppringingar dagliga, sigur Beinta. Fólk spyrja um tíð hjá læknanum, mangla læknaváttan, ynskja at vita meira um, hvat skal henda við teirra viðgerð – og so hjálpa vit teimum. Arbeiðið krevur eisini førleikar at samskifta á enskum og donskum við bæði sjúklingar, læknar og konsulentar.



Skurðdepilin tekur sær av fleiri læknaligum økjum so sum ortopedkirurgi (musklar og bein í kroppinum), gynækologi (kvinnusjúkur), parenkymkirurgi (tey bleytu organini í kroppinum), urologi (nýrur og landrás), eygnadeildini, oyra/nasa/háls, skaðastovuni, mammakirurgi (bróst), endoskopi og obstetrik (føðideildin).

Læknaskrivarar eru ein týðandi fakbólkur í sjúkrahúsverkinum, sum tryggjar samskifti, skjalfesting og tænastu til sjúklingin. 💪

## Rannsóknarstovan er útgjørd við hópin av nýmótans tøkni

Rannsóknarstovan er útgjørd við hópin av nýmótans tøkni, og her verða allar kanningar gjørdar, hvørt tað er vætukanningar, beinagrindskanningar, nýrakanningar, vevkanningar, mikrobiologiskar kanning o.s.fr. Tá tú tekur eina blóðroynd, so er tað her, at títt blóð verður kannað. 🏥🛡💉



Ann er deildarleiðari á Rannsóknarstovuni har eini 30 starvsfólk starvast. Tey sita handan leiktjøldini við framkomnum maskinum, sjóneykum og eini kønari hond og gera kanningar av biologiskum tilfari fyri at staðfesta sjúku, so læknar kunnu geva sjúklingum røttu viðgerðina. 🔬💊

Fyri ein óroyndan er hetta ein fremmandur heimur, men hesi duga og vita hvat tey gera. Eini 100 ymiskar biokemiskar analysur kunnu gerast á Rannsóknarstovuni.

Eitt nú hava tey eina stóra maskinu, sum uppá stutta tíð kann eyðmerkja hvat slag av bakterium er í m.a. blóðinum hjá fólki.
Tá læknin fær upplýst bakteriuslagið, veit hann hvat fyri antibiotika sjúklingurin kann viðgerast við.

## Millum 10.000 og 15.000 fet um dagin í Goymsluni

So nógv ganga starvsfólkini á Goymsluni á Landssjúkrahúsinum dagliga - í arbeiðstíð. 👉



Tey flestu kenna helst sjúkrahúsið sum bygningarnar á J.C. Svabosgøtu, men á Eirargarði finnast tænastufunktiónir, har eitt nú køkur, vaskarí og goymsla eru staðsett.

Tunnilin undir Landssjúkrahúsinum er uml. 1 km langur, og er týðandi í logistiskum høpi, tí hann samantvinnar sjúkrahúsbygningarnar 🏥🏢og verður nýttur sum farleið fyri eitt nú mat úr køkinum og vørur frá goymsluni.

Dagliga fara 4 til 8 vognar 🚇 fyltir við vøru frá Goymsluni oman ígjøgnum tunnilin og út á ymsu deildirnar.

Arbeiðsdagurin hjá starvsfólkunum í Goymsluni byrjar kl. 7.00 við at avlesa brikkaskipanina, sum sjúklingadeildirnar brúka at bíleggja við.
Síðani skulu vørurnar heintast í ymsu goymslurúmunum og stáplast á vognarnar.
Tíðliga út á seinnapartin verða vørurnar fluttar umvegis tunnilin og út á deildirnar, eftir at køkurin hevur fingið sínar matarvognar niðan aftur úr tunnlinum aftaná døgurðan.

Vøra verður avgreidd til ymsar bygningar ymsar dagar í vikuni. Onkur bygningur fær tó vøru fleiri ferðir um vikuna, eitt nú har skurðstovurnar eru.
Eyka vørubíleggingar, sum ikki náa at koma við vanliga flutninginum seinnapartar, kunnu flytast út á deildirnar við einum vogni, sum megnar at hála eitt heilt tons eftir sær.
Tí ber væl til hjá einum starvsfólki einsamalt at flyta eina størri mongd av vøru hagar, hon er umbiðin.



Út yvir vøru til Landssjúkrahúsið, avgreiðir Goymslan vøru um alt landið, sum verður bíløgd umvegis telefon, fax ella t-post. 💻📱

Stóra arbeiðsøkið viðførur at starvsfólkini á Goymsluni ganga millum 10.000 og 15.000 fet um dagin. Tí umframt tunnilin, er Goymslan sjálv umfatandi øki við longum gongdum og nógvum goymslurúmum. Starvsfólkini hava tó eisini møguleika at brúka rennihjól at flyta seg skjótari við um neyðugt.🛴
Goymslan er ein av deildunum, sum fer at flyta inn í nýggja H-bygningin, tá hann stendur klárur um nøkur ár. 😊

#ViteruLS

# Jóan Símun er í bygginevndini

Nýggi bygningurin verður eitt stórt framstig fyri tí tænastu, sum vit kunnu bjóða føroyingum, ið tørva læknaliga hjálp, sigur Jóan Símun Saltá.

Jóan Símun er leiðari á Tænastudeplinum á Landssjúkrahúsinum og er limur í bygginevndini, ið varar av útbyggingini av nýggja H-bygninginum. 🏥🛡



Útbyggingin fevnir um nýggjar medisinskar seingjardeildir, føði- og barnsburðardeild, psykiatriskan depil, hølir til sjúkrahúsuppvenjing og høvuðskøk. Í kjallaranum verður tøknirúm til sjógvhita...pumpur, seingjavaskisentralur, høvuðsgoymsla, parkering og rúm til burturkast. Samlaða gólvvíddin er uml. 14.500 fermetrar.

Útbyggingin fyllir nógv hjá Jóan Símun, ið sum leiðari á Tænastudeplinum hevur ábyrgd av øllum bygningum á LS. Og tað merkist, at hann er spentur uppá hesa uppgávu, hóast tað ganga nøkur ár til H-bygningurin er klárur at taka í nýtslu.

Byggifundir eru fleiri ferðir mánaðarliga, og nú stoypiarbeiðið er byrjað, sæst veruliga at gongd er komið á arbeiðið.

Tilsamans eru 652,6 mió. kr. játtaðar til útbyggingina av Landssjúkrahúsinum, ið eftir ætlan verður liðug í februar 2021.

#ViteruLS



Okt. 2017

# Sjúkrahúsprestur og sálarhirði

Sverri Steinhólm er sjúkrahúsprestur á Landssjúkrahúsinum. Starvið er partur av hansara uppgávum sum sóknarprestur í Havnar kirkju. Í gerandisdegnum á Landssjúkrahúsinum eru uppgávurnar ymiskar.

**Gudstænastur og stovugongd**

Hann møtir fólki í samband við gudstænasturnar, sum hann heldur á ymsum deildum 2-3 ferðir um vikuna. Undan hvørji gudstænastu heilsar hann uppá tey sum eru á deildini, eisini inni á hvørjari stovu. Tá verður tosað um leyst og fast, og ofta kann hann tríva í evnið, sum hevur við gudstænastuna at gera. Um høvið býðst, kann hann eisini biðja eina bøn saman við sjúklinginum.




Á Apopleksideildini eru sjúklingar, sum kunnu vera ringir at skilja, ella sum als ikki megna at svara, tí tey orsakað av blóðtøppi ella heilabløðing illa fáa tosa. Um avvarðandi ikki eru hjá at hjálpa til við samrøðu, situr hann hjá teimum eina løtu og greiðir eitt sindur frá egnum gerandisdegi ella tosar um okkurt meiri alment.

**Er um tey, sum missa**

Sverri er eisini um avvarðandi, sum missa, og hann er tí altíð á tilkallivakt. Um neyðugt, kemur hann inn á Landssjúkrahúsið kvøld og nætur.
Við vanlukkur er uppgáva hansara at vera um tey nærmastu avvarðandi, eins og hann hjálpir til við eitt nú at finna útav, hvør resurssupersónur er í familjuni, sum kann boða familju og vinum frá. Hetta skal ganga skjótt fyri seg í dag, tí á sosialu miðlunum eru fólk skjót at reagera. Umfatar vanlukkan fleiri fólk, er hann eisini tilbúgvingarprestur, og tískil tann, sum tilkallar aðrar prestar og raðfestir, hvørja uppgávur hesir skulu fremja í støðuni. Møtir familja og vinir upp á Landssjúkrahúsinum, má hann finna útav, hvørji eru tey nærmastu, sum hann skal taka sær av. Hesi skulu hava møguleika at vera saman í friði fyrstu tímarnar aftaná, uttan at onnur eru hjá, hóast vinir eisini kenna seg hava mist.

Spurdur, hvat hann tosar við tey avvarðandi um í støðuni, svarar hann, at hann kann hjálpa við at seta orð á kensluna av meiningsloysi í tí, sum er hent. Hann heldur, at týðandi er eisini bara at vera til staðar, at halda í hond og troysta.

**Á føðideildini**

Av og á verður prestur tilkallaður á føðideildina, eitt nú tá ein familja er vitandi um, at eitt barn, sum er føtt, hevur álvarsliga sjúku og fer at doyggja. Uppgávan hjá sjúkrahúsprestinum kann tá vera at doypa barnið, um familjan ynskir tað, og annars at vera um familjuna bæði áðrenn og aftaná, at barnið er farið. Ofta situr familjan við barninum í nakrar tímar aftaná, og tá hyggur Sverri inn til familjuna við millumbilum.
Tá hann seinni vitjar tey aftur í heiminum, kann hann hjálpa við at seta orð á sorgina og tómleikan, ið foreldrini sita eftir við.

Tað er ymiskt, hvussu familjur ynskja at jarða eitt barn, sum bert hevur livað í nakrar tímar. Summi lýsa í miðlunum við deyða og jarðarferðini hjá tí lítla, ið viðførir, at nógv fólk koma til jarðarferðina, ímeðan onnur velja at samla tey allar nærmastu til hesa løtuna.

**Tey avvarðandi hava leiklut**

Sverri heldur, at tað er góð sálarrøkt at taka sær av sínum egnu, tá fólk doyggja. Tí roynir hann at fáa tey avvarðandi til sjálvi at taka støðu til praktiskt ting í sambandi við deyða og jarðarferð. Tað gerst ein parturav sorgartilgongdini, sum krevur, at tey avvarðandi eru aktiv heldur enn at falla í fátt.
Sorgin er har óansæð, men sjúkrahuspresturin heldur, at týðandi er at vera virkin hóast umstøðurnar, tí tað kann hava stóran týdning, sum frá líður, at tey avvarðandi sjálvi tóku støðu til, hvussu jarðarferðin fór fram heldur enn at lata onnur taka hond um hetta.



Er bønarhald fyrst á sjúkrastovuni, aftaná at ein er deyður og seinni aftur í kapellinum á Landssjúkrahúsinum, hava tey avvarðandi fingið møguleika at reagera fleiri ferðir innan sjálva jarðarferðina, og eisini tað er ein liður í sorgini, sum ger jarðarferðina eitt vet lættari at koma ígjøgnum.
"Fyrstu ferð ein kemur inn og sær tann deyða í kistuni, kunnu kenslurnar vera ógvusligar. Fer tann avvarðandi út aftur og kemur inn aftur aðru ella triðju ferð, er reaktiónin jú ikki tann sama", sigur Sverri.

Tað er eisini ymiskt, um tey avvarðandi ynskja at hava bæði bønarhald í kapellinum á Landssjúkrahúsinum ella bert í kirkjuni. Fyrr var bønarhald í kapellinum oftast, tá tann deyði skuldi jarðast á bygd, men nú brúka havnarfólk eisini kapellið til bønarhald, innan farið verður í kirkjuna.
Kommunurnar kring landið bjóða sær til at flyta kistuna av Landssjúkrahúsinum út á bygd uttan kostna ella frá flogvøllinum til hagar, tann deyði skal jarðast, um viðkomandi er deyður uttanlands.

**Sálarhirði**
Av tí at ein týðandi uppgáva hjá presti er at verða sálarhirði, hevur hann tikið fleiri fak innan evnið á universitetinum í Keypmannahavn, har m.a ber til at taka eina Masterútbúgving í Almen sjælesorg.
Sverri er limur í danska og norðurlendska felagnum fyri sjúkrahúsprestar, og haðani verður eisini skipað fyri skeið í sálarrøkt.

Sálarrøkt og sálarfrøði er ikki tað sama, og tað leggur hann eisini dent á, tá hann tosar við tey, sum eru innløgd á sjúkrahúsinum. Tá hann eitt nú vitjar á afturlatnari psykiatriskari deild, har fólk við sálarsjúkum eru innløgd, fær hann ofta høvi at hoyra um ymsar lagnur. Ein góður opin spurningur, hann plagar at spyrja, er: “Hvussu hevur tú tað í dag?”

Hann greiðir frá, at herfyri hevði hann gudstænastu á einari psykiatriskari deild. Gudstænastan byrjaði kl. 11. 00, men hann var ikki liðugur á deildini fyrr enn kl. 15.00, tí soleiðis fór dagurin við at lurta og práta við fólk.

Sverri leggur dent á, at hann hevur eina heildartilgongd til tey menniskju, hann møtir. “Sjúkan, ið fólk dragast við, tá tey eru innløgd, er ikki eins viðkomandi fyri meg, sum hon er hjá heilsustarvsfólkunum. Tað er ikki sjúklingum, eg møti, hóast eg arbeiði á sjúkrahúsinum, - eg møti menniskjum. “

# Á føðideildini er ongin dagur eins

Heidi starvast sum ljósmóðir á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, og har er ongin dagur eins.
Hendan dagin byrjaði vaktin hjá Heidi við, at ein barnakona kom inn við sjúkrabili orsakað av bløðing.
Uppgávan hjá Heidi er tá at taka ímóti og vurdera, hvussu støðan er. Hon kannar hjartaljóð á barninum og verkirnar við CTG tóli, og somuleiðis hvar móðurkakan situr, innan hon kannar mammuna fysiskt.



Tá ein barnakona kemur inn á føðideildina á hendan hátt, hevur lækni fingið boðini frammanundan. Men um Heidi vurderar, at støðan er friðarlig, verður bert hildið eyga við móður og barn, til føðingin fer í gongd.
Í hesum føri endaði støðan við einari heilt vanligari føðing seinni á degnum.

Heidi hevur verið ljósmóðir í nærum 23 ár. Hon las á Metropol í Keypmannahavn. Hareftir var hon ½ ár á føðideild á Ríkissjúkrahúsinum og síðani 3 ár á Gentofte sjúkrahúsi.
Somuleiðis hevur hon starvast á føðideild í USA í 3 ár.
Hon er glað fyri royndirnar, ið hon hevur fingið uttanlands, og starvast framvegis av og á sum vikar bæði í Danmark og Noregi, tá til ber.

### Tekur ímóti 40-50 børnum árliga

Í fjør vóru 680 børn fødd í Føroyum, og Heidi tók ímóti uml. 40-50 av teimum. 👶
Nógvar mammur minnast uttan iva, hvør ljósmóðurin var, ið tók ímóti hennara børnum, tí tað er ein so serstøk støða. Men minnist ljósmóðurin so eisini mammurnar?
Heidi svarar, at hon minnist neyvan allar. "Men summar føðingar minnist eg fyri tað góða, eitt nú um sambandið við mammuna undir føðingini hevur verið serliga gott. Aðrar føðingar minnist eg fyri tað minni góða, um t.d. ikki gekk sum ætlað."

### At linna um pínu

Ein uppgáva hjá ljósmóðurini er at linna um pínuna hjá barnakonuni á ymsan hátt. Heitt vatn, varmadunkar og at fara í baðikar bøtir um, og summar barnakonur kenna eisini betran við akupunktur. Harumframt ber til at nýta láturgass ella at sproyta sterilt vatn undir húðina har pínan er ringast. Hjálpir hetta ikki, er medisin av morfinslagi eisini ein møguleiki. 💉💊
Um alneyðugt verður eisini veitt epiduralblokada, sum er lokaldoyving niðarlaga í rygginum, soleiðis at mamman onki merkir yvirhøvur. Hetta kann tó hava við sær, at føðingin tekur longri tíð.

Endar ein føðing við akuttum keisaraskurði, fylgir Heidi við mammuni frá føðistovuni og yvir á skurðstovuna. Har fremur ein serlækni í kvinnusjúkum sjálva skurðviðgerðina og handar barnið til ljósmóðrina, sum so tekur hond um tað.
Aftaná keisaraskurð heldur ljósmóðurin eyga við mammuna í 2 tímar. Er alt sum tað eigur, vera tað starvsfólk á barsilsøkinum, sum hareftir taka sær av móður og barni, til tey fara heim.

### Makin hevur stóran leiklut

Í dag er heilt vanligt at komandi pápin ella onkur annar, ið stendur mammuni nær, er við inni á føðistovuni, tá barnið er á veg. Heidi greiðir frá, at tað hevur stóran týdning fyri mammuna, at onkur av hennara nærmastu er hjá undir føðingini. Hon heldur tó, at pápar ofta kenna seg heldur hjálparleysar, tí teir ikki fáa bøtt tað stóra um støðuna.
Heidi hevur eisini upplivað, at onkur pápi hevur lagt seg niður á gólvið undir føðingini, - ikki tí hann gjørdist illa fyri, men tí hann knappliga metti tað vera alneyðugt at kanna, um gólvreingeringin var í lagi...☺

Heidi er í løtini saman við einari aðrari ljósmóður í ferð við at taka skeið, sum veitir teimum fakligan førleika at skanna barnakonur. Í seinastuni hava bert serlæknar í kvinnusjúkum framt skanningar av barnakonum á LS. Men ætlanin er eisini at fremja rutinu skanningar framyvir, sum Heidi og hin ljósmóðurin so kunnu átaka sær.
Skeiðið umfatar modulir á tilsamans 10 vikur umframt upplæring.

Spurd um, hví hon valdi at blíva ljósmóðir, svarar hon, at fakliga hevur tað altíð hugtikið hana at taka sær av barnakonum, hóast ábyrgdin er stór. "Tí ongin føðing er eins, og at taka ímóti einum barni er jú nakað heilt serstakt."



Anna, Heidi og Jytte sum allar starvast sum ljósmøður

# Bamsuskaðastova á Mentanarnátt

Hetta var fyrsta tiltakið á Mentanarnátt á Landssjúkrahúsinum, har børnini vóru í fokus. Endamálið var at geva teimum eina uppliving av sjúkrahúsinum, uttan at tey sjálvi vóru í fokus, men har tey komu við sínum sjúku ella ússaligu bamsum.



Omanfyri 200 børn vitjaðu við stórum og smáum bamsum, og børnini dugdu sera væl at greiða frá, hvat ið feilti bamsuni. Nógvar høvdu brotið arm ella bein, fleiri høvdu sár og onkur kom enntá inn við hjartastopp!
Børnini vóru sera arbeiðssom og áhugað í at viðgera bamsuna saman við heilsustarvsfólkunum, og mett var, at allar bamsunar komu væl í gjøgnum skaðastovuna.

Børnini høvdu eisini møguleika at royna høkjur og rullustól, tekna og lesa í meðan tey bíðaðu. Í forhøllini  fingu tey ballón og okkurt leskiligt.
Uttanfyri høvuðsdyrnar var sjúkrabilur, har tey kundi vitja og hoyra meira um, hvussu bamsan vildi fingið pre-hospitala viðgerð ávegis til sjúkrahúsið.



Heilsukunning og dygd hevði somuleiðis gjørt eina lítla framsýning við hagtølum um børn á Landssjúkrahúsinum.

Landssjúkrahúsið luttók fyrstu ferð við tiltøkum á Mentanarnátt í 2013, so hetta var 4 árið har børnini nú eisini fingu eina vónandi góða uppliving av sjúkrahúsinum.

Greinarnar um starvsfólk á Landssjúkrahúsinum eru framleiddar í 2017 -2019 til sosiala miðilin Facebook.

Endamálið var við løttum málburði og meiri óformelt at geva borgarum innlit í gerandisdagin á Landssjúkrahúsinum.

Greinarnar eru nú savnaðar í hesum lítla bóklingi og finnast eisini á heimasíðu okkara www.ls.fo undir **Útbúgving**

Myndir og tekstir: Jákup Justinussen og Katrin Joensen ©2019